# Klokku-Hans fimmti

Tað verður so mangan sagt um føroyingar í útlegd í t. d. Danmark, at teir »dvældust á Flatlondum ævina alla«. Men Hans Korsgaard, sum er dani, hevur dvældst í Føroyum eftir hondini meginpartin av ævi síni, nú hann rundar tey hálvthundrað í dag. Hann kom til Føroya fyri áleið 25 árum síðani í sambandi við at »Ursølan« hjá Arnold Berg læt upp handil í SMS, tá annað byggistig av handilsmiðstøðini gjørdist veruleiki, og har var Hans so sum urmakari og seljari, og honum dámdi hetta so sera væl.

Hans sigst vera tikin úr leikum sum sølumaður – forrætningsmaður, so tað gekk ikki von tíð, so læt hann upp egnan handil, ið bar navnið »Klokkan«, í Dr. Jakobsensgøtu, og væl lá fyri hjá hesum fryntliga og skemtiliga dana – ja so væl, at hann nøkur ár eftir hevði vunnið sær høli uppi í SMS yvir av Føroya Banka, har hann húsaðist til einaferð seinnapartin í nítiárunum, tá hann og Gissur Patursson kastaðu saman og løgdu lunnar undir tann væleydnaða handilin »3'aran«.

Tilætlað ella ikki, so hava



Gissur og Hans á ein hátt brotið upp úr nýggjum við hesum stigi at leggja saman fyritøkur. Í øllum førum er tað vorðið alt meira vanligt, at virkir og handlar kasta saman ella skifta eigarar – eitt nýtt frískligt lot í føroyskari handilsvinnu! Seinni hava Hans og Gissur fingið Høgna við í eigaraskaran, so teir soleiðis kunnu liva upp til navnið »3'aran«.

Men alt hevur sína tíð...

Nú frættist, at Hans í næstum letur upp ein fjórða handil, so hann ætlar yvir høvur ikki at leggja árarnar inn, nú hann er farin »yvirum« markið...

Á heimligu síðuni kann sigast um Hans og konuna Anni, at tey so sanniliga hava megnað at skapað hugnalig heim – tað síðsta á heygnum uppi yvir Gundadali – og fyri at leggja dent á tað, so hevur Hans júst skipað so fyri, at flag er lagt á tekjuna!

Um tað so er afturhvarvið – nostalgiin – sum er komin yvir Hans, tað vita vit ikki reiðiliga, men hann sæst nú javnan í Havnargøtum, koyrandi ein Ford A frá 1930 – einum 76 ára gomlum bili. Hetta er uttan iva eitt hugnaligt ítriv, men vit sum kenna Hans munnu vænta, at okkurt »forrætningsmessigt« býr aftanfyri. Í øllum førum hevur hann dragsað nógv gomul fruktblikk gjøgnum Havnargøtur í summar við brúðarpørum – so vitið eftir, har munnu onkrar krónur vera at vinna...

Leysasøgur vilja eisini vera við, at tá hann í síni tíð gekk á háskúla á Flatlondum, var eitt tað fyrsta hann gjørdi at keypa eina rúgvu av góðgæti og sodavatni, ið hann so seldi til hinar næmingarnar – við einum fittum vinningi.

Í 3'aranum siga tey um Hans, at hann altíð er skjótur við einum svari:

» - Jeg sidder bare her og fiser den af...«

» - Ok, det fixer jeg...«

» - Det kan jeg fixe og gøre meget billigere...«

» – Det fixer jeg i eftermiddag eller i morgen...

– Vit ynskja, at tú, Anni, Rúni og Andri fáa ein góðan dag saman við okkum øllum – og ikki minst tíni familju, ið er komin úr Danmark.

– So Hans Korsgaard – ella rættari »Hanus í Krossgerði« sum tað kanska hevði verið á húðaskógvaføroyskum – hjartaliga tilluku við teimum fimmti.

**-vinir**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jenny Victoria Holm Mortensen**, av **Tvøroyri**, vanliga nevnd **Missan**, andaðist á Suðuroyar ellis- og røktarheimi, mikudagin 26. juli, 86 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

†

Tað verður kunngjørt fyri ætt og vinum,
at okkara góða mamma, omma og langomma

**Sunneva Thomassen**

f. Gøte - ættað úr Norðagøtu
búsitandi í Klaksvík

andaðist 25. juli 88 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum 27. juli kl. 18.00.
Jarðarferðin verður fríggjadagin 28. juli
kl. 13.30 úr Kristianskirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Ørvur, Einar, Kjartan og Marianna**

## Ólavsøkudagarnir

**28. juli. Aurelius**
Deyðu umleið 852. Í faðirætt vóru bæði hann og konan Natalia av mauriskum fólki, men tey vóru í loyndum kristin. Tá ið tey saman við øðrum alment viðgingu kristnu trúgv sína, vórðu tey tikin av mauriska emirinum og hálshøgd.

**29. juli. Ólavsøka**
Verður hildin til minnis um, at norski kongurin Ólavur Haraldsson fell á Stiklastøðum í árinum 1030. Eftir deyða hansara hendu mong undurverk við grøv hansara, og skjótt veður hann mettur sum mikið halgimenni og fær navnið Ólavur hin Heilagi. Minningardagur hansara varð hildin um øll Norðurlond, men serstakliga í Føroyum hevur dagurin í øldir verið hildin mikil hátíðaradur, sum Janus Djurhuus sigur frá:
Stiklastaða vápnabrestur
slongdist yvir havið vestur
Ólavsøkan gjørdist tjóðarhátíð okkara. Hon var eyðkend við, at tingið varð sett ólavsøkudag og hildin varð ólavsmessa í Havnar kirkju. Eisini tey árini, tingið varð sett seinni um heystið, var ólavsøkuguðstænasta hilin. Tað er í nýggjari tíð, at ólavsøkuhaldið, sum tað nú er, er íkomið. Tingsetan og guðstænastan eru við sama lag óloysandi partar av ólavsøkuhaldinum. Fríggingarmyrkt sigst vera tveir tímar á ólavsøku.
Ólavur er norrønt navn, ið merkir bæði ættarfaðir og eftirmaður.

**30. juli. Abdon**
Deyður umleið 250. Høgt mettur embætismaður í Róm, sum varð tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

**31. juli. Germanus**
Deyður umleið 448. Føddur í Auxerre í Fraklandi. Var løgfrøðingur og fekk høgt starv sum embætismaður, men varð 40 ára gamal ímóti vilja sínum valdur til biskup í Auxerre. Hann doyði í Ravenna í Italiu

# Tøkk

Hjartaliga takk øll tit, sum gjørdu mær
áttati ára dagin til ein góðan
og hugnaligan dag.
Takk fyri heilsanir av ymiskum slag.
Gud signi tykkum øll.

**Ása Kristiansen**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði sonur, beiggi, og pápi

**Anker Borgardal**
Sandvík

so brádliga doyði, og var jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum komu í heim okkara og tykkum sum ringdu, takk fyri góð og troystarrík orð, tøkk til Sverra Steinhólm og tykkum mongu, sum vóru við har.
Tøkk til Jónsvein Bech í kirkjuni, til kirkjutænarar, organist, berarar, sangarar og gravarar.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu Anker til hansara seinasta hvíldarstað.
Hartans tøkk til tykkum mongu, ið lótu til ervi og tit sum gjørdu til í bygdarhúsinum.
Tøkk fyri blómur
Tøkk tit nógvu, sum mintust Anker
við minnisgávu til synirnar.

**Mamma, pápi, systkin, Brian og Mark**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Jonna Rasmussen**
Sørvágur

doyði og fór til gravar.

Tøkk til starvsfólkini á Sjúklingahotellinum Tórshavn.
Tøkk til starvsfólkini á Ellis- og Avlamisheiminum í Vágum.
Tøkk til Ingu P. Dam, prest, fyri troystarrík orð.
Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Føroya Felag móti Krabbameini.
Hjartans tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarandi*
**Eyðun, Hrønn, Berg og Hjarvil**